# Sjóvinnupolitikkur



**Uppskot og tilmæli**

**Juli 2010**

## INNIHALD

1. BAKSTØÐI OG ARBEIÐSSETNINGUR............................................................3
1.2 INNGANGUR - FØROYAR Í SJÓVINNUHØPI.........................................4

2. VISIÓN OG SJÓVINNUPOLITISK MÁL..............................................................4
2.1 VISIÓN.......................................................................................................5
2.2 ÍTØKILIG SJÓVINNUPOLITISK MÁL.......................................................5
2.3 TILMÆLI UM, HVUSSU SETTU MÁLINI VERÐA ROKKIN.................6

3. VIRKISÆTLAN FYRI, HVUSSU MÁLINI VERÐA ROKKIN ............................7
3.1. FAS SKIPANIN, SUM EIN DYGDAR SKRÁ.............................................7
3.2 ØKJA MUNANDI UM TALIÐ AV SKIPUM Í FAS……………………....8
3.3 FAS SKIPANIN SKAL MENNA HJÁVINNUR ..........................................9
3.3 MARITIMAR ÚTBÚGVINGAR V.M.........................................................9
3.4 FØROYAR SKULU VERA FRAMMARLAGA Í ARBEIÐINUM INNAN HEILSU, UMHVØRVI OG TRYGD Á SJÓNUM……………….11

4. GREINING..........................................................................................................12
4.1 FYRIMUNIR OG VANSAR VIÐ FAS……………………………………12
4.2 HVUSSU FÆR FØROYSKA SAMFELAGIÐ INNTØKUR FRÀ FAS….13
4.3 FAS-SKRÁSETING - BEINLEIÐIS INNTØKUR………………………..13
4.4 FAS-SKRÁSETING - AVLEITT VIRKSEMI……………………………14

5. KELDUR ............................................................................................................16

# 1. Bakstøði og arbeiðssetningur

Landsstýrismaðurin í vinnumálum setti í desember 2009 ein arbeiðsbólk við umboðum fyri viðkomandi myndugleikar og umboðum fyri vinnuna at orða ein politikk fyri føroyska sjóvinnu. Ítøkiliga uppgávan hjá bólkinum hevur verið, at

***"orða visión og mál fyri føroyska sjóvinnu og herundir lýsa fylgjandi tættir:***

- ***Avleitt virksemi av FAS skrásettum skipum***
- ***Útbúgvingarviðurskifti***
- ***Krøv til skip í FAS***
- ***Útinnan av eftirliti***
- ***Altjóða- og nationalar reglur***
- ***Altjóða konventiónir"***

Tey sum hava sitið í arbeiðsbólkinum eru:
Maria Róin, Vinnumálaráðið, formaður
Esther Dahl, Reiðarafelagið fyri Farmaskip,
Óli Hans Hammer Olsen, Maritimt Forum,
Tommy Petersen, FAS og
Vilhjálmur Gregoriussen, Skipaeftirlitið.

Meinhard Eliassen, Maritimt Forum, Sóleyð Poulsen, FAS, Anna Borg Dahl, Vinnumálaráðið, og Petur Elias Nielsen, Skipeftirlitið, hava staðið fyri skrivaraarbeiðinum.

Arbeiðsbólkurin hevur hildið regluligar fundir, har ítøkiligar ætlanir vóru lagdar fyri, hvussu arbeiðið skuldi leggjast til rættis. Sum partur av kanningararbeiðinum hava advokatur, grannskoðari og umboð fyri vinnuna verið og lagt fram teirra sjónarmið, eins og umboð fyri Vinnuháskúlan og Mentamálaráðið hava lagt fram teirra ætlanir á útbúgvingarøkinum. Eftir hetta møttist skrivaratoymið til at greina og savna tilfarið í álit, sum eftirfylgjandi varð lagt fyri stýrisbólkin til víðari viðgerð.

Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum byggir í stóran mun víðari á "*FAS Álitið*" frá 2006, og tær royndir, sum FAS-umsitingin og Skipaeftirlitið hava havt hetta tíðarskeiðið, síðani sjøtul av álvara varð settur á at marknaðarføra FAS-skipanina. Staðfest verður, at FAS-skipanin er farin at virka, og verður høvuðsdenturin í hesum áliti lagdur á at lýsa, hvussu skipanin kann skapa inntøkur, avleitt virksemi og vøkstur fyri føroyska samfelagið.

Arbeiðsbólkurin hevur í arbeiði sínum, umframt at fáa íblástur frá FAS álitinum frá 2006, eisini fingið íblástur frá FAS frágreiðingini frá 2008, álitinum um bachelorútbúgvingar á Vinnuháskúlanum frá 2006 og frá maritimum frágreiðingum og strategium, sum orðaðar eru fyri okkara grannalond og ES seinastu árini.

Álitið er soleiðis uppbygt, at visión, mál og strategi standa í kap. 2. Í kap. 3 eru útgreinað tilmæli um, hvussu settu málini verða rokkin. Í kap. 4 er gjørd ein greining av, hvørjar fyrimunir og vansar FAS hevur fyri føroyska samfelagið, og hvussu føroyska samfelagið í løtuni fær inntøkur frá FAS skipanini.

*Avmarking*
Havandi í huga, hvussu arbeiðssetningurin er orðaður, og at fiskivinnan ikki er beinleiðis umboðað í arbeiðsbólkinum, er arbeiðssetningurin tulkaður at snúgva seg um sjóvinnu út frá einum handilsflota sjónarvinkli, og eru atlit ikki tikin til fiskivinnuna.

## 1.2 Inngangur - Føroyar í sjóvinnuhøpi

Málið í yvirskipaða vinnupolitikkinum er at hækka livistøðið í Føroyum og gera føroyska búskapin sjálvberandi. Fleiri ferðir seinastu árini hava føroyingar ásannað, at Føroyar og føroyski búskapurin er serstakliga sárbarur við bert at dúva upp á inntøkur frá fiskivinnu og aling. Skulu vit fáa ein sterkari føroyskan búskap, mugu í framtíðini verða skaptar inntøkur frá øðrum vinnum eisini.

Í 2005 setti táverandi samgonga ein arbeiðsbólk at greina og gera tilmæli um, hvussu ein kappingarfør altjóða skipaskrá kundi setast á stovn og harvið gerast eitt íkast til føroyska búskapin.

Arbeiðsbólkurin handaði landsstýrinum eitt álit í 2006, og vóru tilmælini hesi:

- *At tað beinanvegin verður skipað og uppbygd ein FAS umsiting samsvarandi tilmælunum frá arbeiðsbólkinum.*
- *At tað beinanvegin verður farið undir at tillaga føroysku lóggávuna til fortreytirnar fyri eina kappingarføra FAS skipan og at ein serstøk FAS lóg verður smíðað.*
- *At tað skjótast gjørligt verður farið undir miðvísa marknaðarføring av FAS úti í heimi.*

Síðani eru, samsvarandi tilmælunum frá arbeiðsbólkinum, gjørdar neyðugar broytingar í skattalóggávuni og sett á stovn ein FAS umsiting, sum fór undir eina miðvísa marknaðarføring av skipanini í 2009. Stórur áhugi er fyri skipanini, og miðvísa marknaðarføringin vísir seg at geva úrslit, tí talið av skipum, sum velja at skráseta seg í FAS, er í støðugum vøkstri. Síðani 1. mai í 2008 hava 18 skip valt at skráseta seg í FAS, og er tonsatalið í hesum tíðarskeiðið økt við áleið 90%.

Sjóvinna er ein vinna, sum virkar á einum altjóða marknaði, har stór krøv verða sett, og kappingin er hørð. Tískil er tað av stórum týdningi fyri at kunna vera kappingarfør, at karmarnir rundan um hesa vinnu kunnu vekja áhuga og samstundis eru støðugir, men eisini leypandi verða mentir samsvarandi teimum krøvum, sum verða sett altjóða.

Landafrøðiliga liggja Føroyar væl fyri mitt úti í Atlantshavinum við einum sjóøki upp á 274.000 km2, sum er næstan 200 ferðir størri enn føroyska landøkið. Í fleiri hundrað ár hava vit livað við havið og av tí, sum havið gav. Allur framburður í Føroyum hevur verið og er enn neyvt tengdur at sjóvegis sambandinum við umheimin.

Føroysk sjófólk hava síðani seinna heimsbardaga verið, um ikki grundarsteinurin, so ein av hollu súlunum undir danska handilsflotanum og seinnu árini eisini norsku frálandavinnuni. Ein stóran part av seinastu øld røktu føroysk reiðarí regluligar farma- og ferðafólkarutur til og úr Føroyum, men seinnu árini hava íslendsk reiðarí keypt part av hesum virkseminum. Tey seinastu 10 árini er rættilig gongd komin á menningina innan frálandavinnuna, soleiðis at nú eru tvey føroysk reiðarí, ið bjóða seg fram sum

veitarar, meðan onnur smærri reiðarí bjóða fram vaktarskip til frálandavinnuna. Føroysk reiðarí arbeiða eisini innan sandgrevstur í grannalondunum.

Føroyar eru ein framkomin fiskivinnutjóð, sum tí hevur náttúrligar fyrimunir í mun til at satsa upp á handilsliga sjóvinnu í strembanini eftir at gera búskapin meiri fjøltáttaðan. Effektiviseringin innan fiskiflotan við færri og størri eindum hevur “frígivið” nógvar fiskimenn, meðan møguleikarnir hjá ungfólki at royna sjólívið eru tilsvarandi avmarkaðir.

Tann náttúrliga tilgongdin av sjófólki í Føroyum væntast at minka komandi árini, samstundis sum eftirspurningurin úti í heimi eftir skikkaðum sjófólki til handilsflotan er vaksandi, serliga eftir yvirmonnum. Tað hevur tí stóran týdning, at Føroyar taka avbjóðingina í fullum álvara og seta tiltøk í verk til tess at tryggja tilgongdina til sjóvinnuútbúgvingarnar.

Veðurlagsbroytingar hesi seinastu árini hava broytt ísviðurskiftini í Barentshavinum soleiðis, at væntast kann, at um fá ár liggja handilsleiðirnar millum Barentshavið og Norðuramerika norðanfyri. Í hesum høpi liggja Føroyar strategiskt sera væl fyri, og í hesum sambandi kann tað væl hugsast, at stórir møguleikar og eisini avbjóðingar liggja fyri framman.

# 2. **Visión, mál og tilmæli**

Tilmælini hjá arbeiðsbólkinum taka støði í arbeiðssetninginum, at leggja til rættis framtíðar sjóvinnumenningina og skapa bestu karmar fyri hesa vinnu. Við at seta sær realistisk mál og at leggja ein støðugan sjóvinnupolitikk til rættis og ikki minst hava tol at bíða, til hesin politikkur hevur havt tíð at virka, ber til at menna ella byggja upp eina gróðrarríka sjóvinnu. Umráðandi er bæði fyri vinnuna og fyri tað almenna, at umrøddu karmar, heruppií teir fíggjarligu, eru støðugir, soleiðis at stórar broytingar ikki fara fram í heilum.

Við støði í frammanfyrinevnda mælir arbeiðsbólkurin til hesa visión og sjóvinnupolitisku mál:

## 2.1 Visión

*At føroysk sjóvinna í fríari altjóða kapping skapar avkast, framburð og vælferð, samstundis sum trygd, trivnaður og umhvørvi verða raðfest ovarlaga.*

## 2.2 Ítøkilig sjóvinnupolitisk mál

- FAS skal á heimskortið sum ein dygdarskrá

- Skráseting av skipum í FAS skal menna hjávinnur, geva týðandi vøkstur og fjøltátta føroyska búskapin

- Í 2011 skulu 100 skip vera skrásett í FAS

- Um ársskiftið 2011/2012 skulu Føroyar vera á hvíta lista hjá Paris Mou

- Føroyar skulu vera frammarlaga í arbeiðinum innan heilsu, umhvørvi og trygd á sjónum

- FAS skipanin skal framhaldandi hava støðugar politiskar karmar at virka undir

- Útbúgvingar- og skeiðstilboð skulu dagførast og útbyggjast sambært tørvi hjá sjóvinnuni og samfelagnum sum heild, og skal tilgongdin til shipping- og sjóvinnuútbúgvingar tryggjast

- Sjóvinnan skal draga til sín vitanartung arbeiðspláss, har vælútbúgvin fólk og fólk við viðkomandi royndum fara at leita sær starv

- Veitarar, reiðarí og onnur, ið hava virksemi og áhuga í sjóvinnu, verða sjónligir og aktivir viðspælarar í víðari menningini av føroyskum sjóvinnupolitikki.

**2.3 Samandráttur av tilmælum um, hvussu settu málini verða rokkin:**

*FAS skipanin, skal vera ein dygdarskrá*

Mælt verður til, at eitt nóg neyvt tekniskt og umsitingarligt eftirlit framhaldandi er við skipunum, at sjóvinnuumsitingin luttekur í altjóða arbeiði og orðaskifti innan trygd, heilsu og umhvørvi, og at lógir og regluverk framhaldandi verða dagførd í samsvari við altjóða krøv og fyriskipanir.

*Føroyska flaggið á hvíta lista hjá Paris Mou í 2012*

Mælt verður til, at átøk viðvíkjandi eftirliti og upplýsing til reiðarí, einstøku skipini og umboðsfólk verða skipað, soleiðis at føroyska flaggið skjótast gjørligt kann koma á hvíta listan hjá Paris Mou. Mælt verður til, at spurningurin verður tikin upp til nærri viðgerð, um aldursmark eigur at verða sett fyri skip, sum kunnu verða skrásett í FAS.

*FAS skal hava við sær at hjávinnur mennast*

Tað verður ikki mett ráðiligt at seta sum krav til útlendsku reiðaríini, at ávísur partur av virksemi teirra skal vera í Føroyum. Mælt verður til, at tað verður ásett krav í FAS-lógini um, at útlendsk reiðarí skulu hava føroyskt umboðsfólk. Umboðsfólkini kenna føroyska marknaðin, og kunnu tí skapa samband millum føroyskar veitarar av vørum og tænastum og útlendsku reiðaríini. Broytingar innan útbúgvingarskipanina, sí niðanfyri, verður eisini mett at kunna stimbra undir, at hjávinnur mennast. Yvirskipað

er uppgávan hjá tí almenna at skapa góðar karmar fyri vinnuna, soleiðis at fortreytirnar fyri at taka kappingina upp á altjóða marknaðinum eru góðar, og ikki at leggja óneyðugar forðingar í vegin. Tað er vinnan sjálv, sum má síggja møguleikarnar.

*Økja munandi um talið av skipum í FAS*
Mælt verður til, at hildið verður fram við somu marknaðarføringsstrategi sum higartil, tí bert á henda hátt kann skipanin veruliga gerast kend úti í heimi. Mælt verður til at arbeiða fyri at fáa í lag cabotagu-avtalu við ES og dupultskattaavtalur við fleiri lond, soleiðis at hetta ikki gerst ein forðing fyri, at ávís reiðarí fara at koma undir føroyskt flagg. Mælt verður til, at sjóvinnulóggávan í minst møguligan mun hevur national eykakrøv ella serkrøv, men tekur støði í altjóða sáttmálum og kotum, sum ásett av eitt nú IMO og ILO, tí hetta hevur týdning fyri kappingarførið.

*Útbúgvingarviðurskifti v.m.*
Mælt verður til, at møguleiki kemur at verða fyri at taka skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar á bachelorstøði, soleiðis at útbúnir maskinmeistarar- og skipsførarar kunnu taka útbúgving á masterstøði. Møguleiki skal vera fyri at taka master útbúgving innan shipping í Føroyum. Aspirantskipan eigur at verða skipað. Møguleiki eigur at vera fyri at taka maritimar útbúgvingar í Føroyum. Á henda hátt verða føroysk sjófólk framhaldandi eftirspurd sum arbeiðsmegi og fer hetta at betra um førleikarnar at reka reiðaravirksemi í Føroyum. Mælt verður til at tillaga galdandi stuðulsskipanir hjá tí almenna soleiðis, at granskingar- og menningarverkætlanir innan maritima økið verða raðfestar sum eitt “innsatsøki”. Hetta verður mett at koma at hava við sær, at meiri fjøltáttað virksemi fer at mennast í Føroyum innan sjóvinnuøkið.

*Føroyar skulu vera frammarlaga í arbeiðinum innan heilsu, umhvørvi og trygd á sjónum*
Neyðug umsitingarlig orka eigur at verða sett av, soleiðis at føroysk sjóvinnulóggáva alla tíðina verður dagførd samsvarandi altjóða sáttmálum, og harvið er á sama støði sum í øðrum londum við atliti til trygd fyri manning og umhvørvi. Skipaeftirlitið/FAS skal hava møguleika til áhaldandi at luttaka í altjóða fora, sum umrøða reglur fyri skipaferðslu, soleiðis at føroysk sjónarmið og áhugamál verða tikin við, tá ið nýggjar altjóða reglur verða ásettar.

# 3. Virkisætlan fyri, hvussu málini verða rokkin

**3.1. FAS skipanin, sum ein dygdarskrá**
Eyðkenni fyri eina dygdarskrá er, at skipini lúka ásettu krøvini, at flaggstaturin hevur eitt neyvt tekniskt og umsitingarligt eftirlit við skipunum, at luttikið verður í altjóða arbeiði og orðaskifti innan trygd, heilsu og umhvørvi, og at lógir og regluverk alla tíðina verða dagførd í samsvari við altjóða krøv og fyriskipanir.

Um FAS skipanin skal koma á heimskortið sum ein enn meiri kappingarfør dygdarskipan, má føroyska flaggið, sum í dag er á ”gráa lista”, koma upp á ”hvíta lista” hjá Paris Mou. Hvar flaggið er á listanum hjá Paris Mou sigur nakað um, hvørt skipini undir føroyskum flaggi lúka tey altjóða krøv, sum verða sett av IMO og ILO.

Skip, sum føra flagg, ið er á svarta lista hjá t.d. Paris Mou, vera í størri mun útsett fyri eftirliti av Port State Control við møguligum negativum fíggjarligum avleiðingum fyri

bæði eigara/reiðara og fyri kundan ella farmaeigaran. Tí vigar hesin spurningur nakað, tá ið reiðarí skulu taka avgerð um val av skráseting/flaggi, hvørjum lista flaggi er á, og er hetta eisini ein mátistokkur fyri, hvørt talan er um eina dygdarskrá.

Mælt verður til, at neyvari tekniskt eftirlit og upplýsing verða sett í verk mótvegis skipunum og reiðaríum í FAS, tí hetta verður mett at kunna betra um møguleikarnar fyri at koma á hvíta listan.

Skipaeftirlitið/FAS hevur ábyrgdina av eftirlitinum við skipunum í FAS, og í tann mun stovnurin ikki hevur tilfeingi til at røkja hesa uppgávu sjálvur, verður neyðugt hjá stovninum, samsvarandi heimildini í løgtinglógini um trygd á sjónum, at lata klassafeløgini ella konsulentar átaka sær uppgávur viðvíkjandi sýn/eftirliti við skipum í FAS.

Um álit skal vera á skipanini, skal avvarðandi almenna umsitingin hava eitt nóg gott førleikastøði innan teknisk viðurskifti, løgfrøði v.m., sum kann tryggja, at lóggávan og útinnan av myndugleikauppgávunum er á einum nóg høgum støði.

Mælt verður til, at spurningurin verður tikin upp til nærri viðgerð, um broytingar eiga at verða gjørdar í FAS-lógini, soleiðis at aldursmark kann verða sett fyri skip, sum kunnu verða skrásett í FAS. Hagtøl í sambandi við Port State Control vísa, at eldri skip oftari verða hildin aftur, sí eitt nú s. 9 í álitinum um FAS.

**3.2 Økja munandi um talið av skipum í FAS**

Núverandi strategi í sambandi við marknaðarføring av FAS er at marknaðarføra eina dygdarskipan til útvaldar kundabólkar. Mælt verður til, at hildið verður fram við somu strategi sum higartil, tí bert við miðvísari marknaðarføring gerst skipanin kend úti í heimi.

Fyri at økja um áhugan fyri FAS er neyðugt, eins og umrøtt í kap. 3.1, at fáa føroyska flaggið á hvíta listan hjá Paris Mou, harumframt verða væntandi cabotagu-avtalur og dupultskattaavtalur við onnur lond mett at kunna vera ein forðing fyri, at ávís skip velja ikki at skráseta seg í FAS.

Skip, skrásett í ES- ella EBS-londum, kunnu sigla cabotagu-sigling í øðrum ES-londum. Føroyar hava bert cabotage-avtalu við Svøríki og Noreg og kunnu harumframt sigla cabotagu-sigling í Danmark og í Íslandi. Søkt kann verða í hvørjum einstøkum føri um, at skip undir føroyskum flaggi kunnu fáa loyvi til slíka sigling í ES-londum, men verður hetta ikki mett í longdini at vera nøkur góð loysn, tí flest øll ES-lond uttan tey, sum eru nevnd omanfyri, mugu roknast at vera sera afturhaldandi við at lata slík loyvi. Hetta kann vera ein orsøk fyri, at nøkur reiðarí ikki velja at skráseta seg í FAS. Tískil verður mælt til, at tað beinanvegin verður farið undir arbeiðið at fáa í lag cabotagu-avtalu við ES.

Tørvur er á dupultskattaavtalum við fleiri lond. Tað er umráðandi fyri FAS-skipanina, at viðurskiftini á skattaøkjunum fyri reiðarí og manning eru greið.

Fáast skulu í lag dupultskattaavtalur og cabotagu-avtalur við øll lond, har tað hevur týdning fyri at gera umstøðurnar hjá føroyskari sjóvinnu betri.

### 3.3 FAS skipanin skal hava við sær at hjávinnur mennast

Nógv av teimum skipunum, sum koma undir føroyskt flagg, koma ongantíð til Føroyar, men kortini sæst longu, at hjávinnur byrja at mennast í sambandi við at útlendsk reiðarí velja at skráseta skip í FAS. Málið er, at sjóvinna skal koma at geva eitt munandi íkast til føroyska búskapin. Eingin ivi skal tó vera um, at tað tekur nøkur ár at byggja eina slíka vinnu upp, tí at byrjað verður heilt frá botni.

Í dag verður kravt, at skipaeigarin skal vera føroyskur, oftast føroyskt stovnað partafelag, og hevur reiðaríið vanliga føroyskt umboðsfólk, sum kann binda eigararnar mótvegis føroysku myndugleikunum.

Fyri at fáa lut í afturberingini av manningarskattinum, mugu útlendsku reiðaríini hava føroyskt bankasamband. Sambært løgtingslógini um trygging móti avleiðingunum av arbeiðsskaða, hava reiðaríini eisini skyldu til at tekna arbeiðsskaðatryggingar í føroyskum tryggingarfeløgum.

Tá ið reiðarí fara undir at kanna møguleikarnar fyri at skráseta skip teirra í FAS, seta tey seg fyrst av øllum í samband við advokatar og grannskoðarar í Føroyum, sum siga seg hava merkt ein øktan eftirspurning frá útlendskum reiðaríum eftir tænastum.

Sambært FAS-lógini kann skrásetingin krevja, at reiðarí hava føroyskt umboðsfólk. Mælt verður til, at hetta verður broytt, soleiðis at útlendsk reiðarí skulu hava føroyskt umboðsfólk. Umboðsfólkini kenna føroyska marknaðin, og kunnu tí skapa samband millum føroyskar veitarar av vørum og tænastum og útlendsku reiðaríini.

Tað verður ikki hildið at vera rætt at noyða tey útlendsku reiðaríini at keypa føroyskar vørur og tænastur. Ávís serfrøði og fyrimunir eru longu í Føroyum, og tað verður ikki mett, at krav um at keypa føroyskar vørur og tænastur fremur eina menning av vinnuni innan hetta øki.

Uppgávan hjá tí almenna er at skapa góðar karmar fyri vinnuna, soleiðis at fortreytirnar fyri at taka kappingina upp á altjóða marknaðinum eru góðar, og ikki at leggja óneyðugar forðingar í vegin fyri vinnuna.

### 3.4 Maritimar útbúgvingar v.m.

Mælt verður til, at tað skal gerast møguligt at taka bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum til skipsførara og maskinmeistara, sum ein bólkur á Vinnuháskúlanum, mælti til í *Álit um bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum* frá juni 2006. Niðurstøðan hjá bólkinum var m.a. hendan:

*"Maritimu útbúgvingarnar hava alla tíðina, síðani tær komu fyri eini øld síðani, ment seg við samfelagsgongdini. Gongdin í dag í Føroyum og øllum Europa er, at allar hægri útbúgvingar verða skipaðar eftir Bolognaavtaluni. Í grannalondunum eru hægri maritimar útbúgvingar á bachelorstøði, og í Føroyum eru og verða fleiri bachelorútbúgvingar. Føroysk sjófólk eiga at fáa sama møguleika sum aðrir føroyingar og sum sjófólk í grannalondunum. Hesa niðurstøðu koma Vinnuhúsið og føroyskir politikarar eisini til í viðgerðini av Visjón 2015. Bæði fólk við miðnámsprógvi og tey við verkligum royndum skulu hava góðar møguleikar til at fáa ávikavist verkligt og ástøðiligt upptøkuskeið, so tey kunnu fáa eina maritima bachelorútbúgving í Vinnuháskúlanum. Sjófólk, sum ikki ætla sær eina*

*bachelorútbúgving, skulu framvegis hava góðan møguleika at fáa eina styttri maritima útbúgving, sum gevur rættindi til størsta partin av føroyska flotanum."*

Í hinum Norðurlondunum og í Bretlandi ber til at lesa til skipsførara og maskinmeistara á bachelorstøði.

Útbúgvingarnar skulu sjálvsagt verða lagaðar til tørvin úti í vinnuni, og mugu í minsta lagi vera á sama teoretiska støði sum útbúgvingar frá útlendskum lærustovnum.

Um útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum verða umskipaðar til bachelorstøði, fer hetta at geva betri møguleika fyri at sleppa framat at nema sær kandidat/master úbúgvingar. Hetta hevði styrkt um førleikarnar innan sjóvinnuna, soleiðis at størri virksemi kundi verið skipað á landi – reiðaravirksemi.

Bæði einstaklingar og samfelagið í sini heild vera fyri stórum avbjóðingum vegna m.a. alheimsgerð, kunningartøkni, kapping, og verða vaksandi krøv tí sett til útbúgvingarskipanina. Stór krøv verða sett til førleikar hjá arbeiðsmegini og má førleikastøðið hjá føroyskum sjófólki vera á sama støði sum í øðrum londum, um vit framhaldandi skulu standa okkum í kappingini um at vera ein av fremstu veitarunum av vælskikkaðari arbeiðsmegi til handilsflotan.

Í løtuni hevur bert ein heilt lítil partur av teimum, sum byrja á Vinnuháskúlanum, frammanundan tikið miðnámsútbúgving. Sambært Visjón 2015 verður miðað eftir, at øll ung fáa eina miðnáms- ella yrkisútbúgving. Um hesin málsetningur fer at verða rokkin, átti tað ikki at verið ein trupulleiki við tilgongdini til sjóvinnuútbúgvingarnar, um tær verða umskipaðar til bachelorútbúgvingar og roknað má verða við, at ungdómurin av sær sjálvum tillagar seg til herdu krøvini.

Mælt verður tó til, at tað framhaldandi eisini skal vera møguligt at taka útbúgving sum skipari ella maskinistur eftir sama leisti sum í dag, ætlað m.a. teimum, sum vilja sigla sum yvirmenn við fiskiskipum. Hesar útbúgvingar lúka í dag minstu krøvini í STCW sáttmálanum.

Tað átti at verið møguligt at tikið styttri og miðallangar útbúgvingar í Føroyum ella í samstarvi við útlendskar lærustovnar, sum eru málrættaðar til arbeiði innan sjóvinnu - eitt nú innan logistikk, teknisk viðurskifti v.m.

Mælt verður til, at ein aspirantskipan verður skipað umborð á handilsskipum, tí hetta verður mett at vera ein góður máti at betra um møguleikarnar hjá ungum føroyingum, sum ynskja at starvast í hesu vinnu, at fáa neyðuga siglingstíð og at royna arbeiði í hesi vinnu tíðliga í lívinum. Í sambandi við, at talið av skipum í FAS er í støðugum vøkstri, og talan er um sterk og góð reiðarí, verður tað mett at vera góður møguleiki fyri at fáa slíka skipan í lag.

Í grannalondunum verður granskað nógv innan sjóvinnuøkið, tað verið seg innan skipabygging, útgerð ella logistikk – serstakliga verður nógv gjørt fyri at finna umhvørvisvinarligar loysnir á øllum økjum. Sjóvinnan ger stórar íløgur í og leggur stóran dent á, at hava vælútbúgvin starvsfólk, tí hetta vísir seg at síggjast aftur í kappingini á altjóða marknaðinum, og tískil hevur tað týdning, at Føroyar kunnu bjóða maritimar førleikar á høgum støði og at betri møguleikar verða í Føroyum at

granska innan hetta økið. Hetta kann eisini hava við sær, at nýggjar loysnir innan eitt nú útgerð v.m. kunnu verða funnar og harvið hjávinnur verða skaptar. Mælt verður til at tillaga galdandi stuðulsskipanir hjá tí almenna soleiðis, at granskingar- og menningarverkætlanir innan maritima økið verða raðfestar sum eitt “innsatsøkið”.

### 3.4 Føroyar skulu vera frammarlaga í arbeiðinum innan heilsu, umhvørvi og trygd á sjónum

Tað er umráðandi, at føroyska sjóvinnulóggávan framhaldandi verður dagførd samsvarandi altjóða krøvum, tí hetta er ein fortreyt fyri, at skip undir føroyskum flaggi yvirhøvur kunnu virka á altjóða marknaðinum.

Lóggávan á sjóvinnuøkinum viðvíkjandi m.ø. tekniskum krøvum til skip, manningarviðurskiftum, verju av havumhvørvinum, og arbeiðs- og liviumstøðunum umborð á skipum, tekur støði í altjóða sáttmálum, sum verða samtyktir av IMO (International Maritime Organisation) og ILO (International Labour Organisation).

ILO og IMO konventiónir eiga at verða implementeraðar so hvørt, sum tær koma í gildi, og skulu umboð fyri Skipaeftirlitið/FAS hava møguleika fyri at luttaka í altjóða forum, sum umrøða reglur fyri skipaferðslu, soleiðis at føroysk sjónarmið/áhugamál verða tikin við, tá ið nýggjar altjóða reglur verða ásettar.

Tað er umráðandi, at national eykakrøv/serkrøv ikki verða sett í gildi, tí hetta kann vera ein vansi fyri FAS-skipanina. Tá ið reiðarí velja flagg, taka tey m.a. atlit til mongdina og slagið av serreglum há einstøku flaggstatunum, tí hetta hevur týdning fyri útreiðslurnar hjá reiðaríunum.

Lóggávan á sjóvinnuøkinum, serstakliga reglurnar við heimild í lógini um trygd á sjónum, eru rúgvismiklar, og er talan um eitt umfatandi tekniskt regluverk um bygging av skipum, útgerð og verju av havumhvørvinum. Mælt verður til, at Skipaeftirlitið/FAS, orsakað av einari lítlari umsiting á sama hátt sum higartil, heldur fram við at nýta reglur um teknisk viðurskifti, sum hini norðurlondini hava sett í gildi, tí hesar lúka altjóða minstukrøvini.

Innan árslok 2011 kemur Maritime Labour Convention væntandi í gildi altjóða, og tá skulu m.a. FAS skipini skjalprógva, at tey liva upp til krøvini í MLC um arbeiðs- og liviumstøðurnar hjá sjófólki. MLC sáttmálin skal tí implementerast í føroyska lóggávu innanfyri tað komandi árið. Broytingar skulu í tí sambandi gerast í sjómannalógini, manningarlógini og í løgtingslógini um trygd á sjónum.

Mælt verður til, at sjólógin verður dagførd. Sjólógin er so at siga eins í øllum Norðurlondum, og eiga tær nýggjastu broytingarnar í norðurlendskum høpi sum skjótast at verða implementeraðar í sjólógina fyri Føroyar.

Føroyar hava atlimaskap í IMO, og er tað Skipaeftirlitið sum umboðar Føroyar á regluligu fundunum í IMO. Føroyar eru limir í ILO gjøgnum Danmark, men vanligt er ikki at senda umboð fyri landsstýrið til fundir í felagsskapinum. Vinnumálaráðið fylgir við í ILO málum, og tekur sær av at gera frágreiðingar til ILO. Alt samskifti við ILO fer fram gjøgnum danska Beskæftigelsesministeriet. Mælt verður til, at

avvarðandi myndugleikar framhaldandi skulu hava møguleika fyri at luttaka í altjóða forum, sum umrøða reglur fyri skipaferðslu, soleiðis at føroysk sjónarmið og áhugamál verða tikin við, tá ið nýggjar altjóða reglur verða ásettar.

# 4. Greining

### 4.1 Fyrimunir og vansar við FAS

Tað hevur gingið væl at marknaðarføra FAS. Í 2009 vóru 11 skip skrásett og í 2010 eru higartil skrásett 5 skip, soleiðis at nú eru tilsamans 47 skip skrásett í FAS. Góð sambond eru fingin í lag, serliga eru tað svenska reiðaraumhvørvið, men eisini norska og danska, sum hava víst skipanini áhuga. Tað kann við vissu sigast, at fleiri skip eru á veg.

Trýstið á umsitingina økist, tá ið talið av skipum í FAS økist, serstakliga á umsitingina á Skipaeftirlitinum, ið stendur sum garantur fyri, at FAS veruliga kann kalla seg eina tekniska dygdarskráseting. Tað er umráðandi at hava eitt sterkt Skipaeftirlit, sum á nøktandi hátt kann røkja tær uppgávur, sum stovnurin hevur.

Skip, sum virka altjóða, herundir eisini FAS skip, eru ikki bara undir eftirliti av flaggstatinum. Tey eru eisini undir regluligum eftirliti av havnastatum og farmaeigarunum (vetting-sýn).

Í løtuni liggur føroyska flaggið á “gráa-lista” hjá Paris Mou, men ætlanin er at koma upp á “hvíta lista” um ársskiftið 2011/12. Til tess at røkka hesum máli er neyðugt hjá flaggstatinum at hava eitt neyvt eftirlit við FAS skipunum, umframt uppfylging, kunning og støðugt samskifti við reiðaríini, so skipini ikki verða afturhildin í útlendskari havn.

FAS-lógin er júst broytt soleiðis, at Skipaeftirlitinum er heimilað at krevja eitt ársgjald fyri hvørt skip, sum er í FAS, og fær Skipaeftirlitinum á tann hátt sett størri arbeiðsorku av til at røkja uppgávuna at lyfta støðið á skipanini soleiðis, at føroyska flaggið kann koma upp á hvíta lista hjá Paris Mou. Í tann mun Skipaeftirlitið ikki hevur orku til at røkja aðrar týðandi uppgávur hjá stovninum við atliti til FAS, eigur stovnurin at útdelegera hetta arbeiðið til fakfólk á avvarðandi økjum, og harvið eisini skapa avleiddar vinnumøguleikar til føroyska samfelagið.

Føroyar hava cabotaguavtalur við Ísland, Danmark, Noreg og Svøríki. Føroysk skip kunnu tí uttan trupulleikar fremja cabotagusigling í Norðurlondum, tó undantikið Finnland. Tað er ein avmarking fyri FAS, at Føroyar ikki hava cabotaguavtalur við ES og møguliga onnur lond við. Á sama hátt er tað ein bági fyri FAS, at Føroyar hava ov fáar dupultskattaavtalur.

Rákið innan altjóða sjóvinnu er ymiskt, alt eftir hvørja vinnugrein talan er um. Viðhvørt er tað eitt beinleiðis krav, at reiðaríini innan ávísar vinnugreinar í stóran mun skulu kunna prógva síni virði, sokallað ***Corporate Social Responsibility,*** fyri at fáa flutningsavtalur. Her hevur FAS-skipanin helst eina av sínum styrkjum við tað, at vit hava fleiri hundrað ára siðvenju á sjóvinnuøkinum. Viðurskiftini við egnum sjófólki, fakfeløgum og lønarsáttmálum eru skipað, eisini fyri útlendingar. Skattaskipanirnar eru á altjóða støði og umsitingarlig og teknisk krøv verða sett til

reiðararnar, samstundis sum peningur og orka verða sett av til at røkka langtíðar málum.

Tað má undirstrikast, at FAS skipanin skal vera liðilig, soleiðis at skilja, at bæði umsiting og politiski myndugleikin støðugt mugu vera til reiðar at dagføra og tillaga skipanina til altjóða broytingar.

### 4.2 Hvussu fær føroyska samfelagið inntøkur frá FAS skipanini?

FAS skipanin kastar longu pening av sær til føroyska samfelagið, tí skipanin hevur við sær, at nógv fólk arbeiða innan reiðaravirksemi í Føroyum, sum gjalda skatt og avgjøld til føroyska samfelagið[1].

Hinvegin so eru inntøkurnar frá hesum virkseminum harafturímóti mistar, um FAS skipanin ikki hevur støðugar karmar at virka undir, soleiðis at tey reiðarí, sum longu eru í skipanini, missa álitið og velja at flyta av landinum til betri sømdir aðrastaðni.



Nøkur av teimum nýggju skipunum í FAS eru føroysk, men meginparturin kemur frá útlendskum reiðaríum. Inntøkukeldurnar niðanfyri høvdu ikki verið til í sama mun, um ikki útlendsk reiðarí fingu áhuga fyri og valdu at skráseta skip síni í FAS. Reiðaríini hava valt FAS, tí FAS er ein kappingarfør altjóða skipaskráseting. Tey útlendsku reiðaríini seta krøv til bæði føroyska vinnu og umsiting, og gevur hetta íblástur og førleikamenning til bæði vinnuna og umsitingina

### 4.3 FAS skráseting – beinleiðis inntøkur

FAS fær inntøkur frá skrásetingargjøldum. Skipaeftirlitið fær inntøkur av málibrævi, útskriving og endurnýggjan av manningarskjølum umframt einum árligum gjaldi – ásett í mun til stødd og aldur á skipi. Skráseting Føroya fær inntøkur frá stovning av partafeløgum, ársgjøldum og fráboðanum. TAKS fær inntøkur frá partafelagsskatti og/ella tonsaskatti.

### 4.4 FAS skráseting – avleitt virksemi

[1] Reiðarafelagið fyri Farmaskip - Frágreiðing um FAS frá febr. 2008, s. 16-19.

Fyri at fáa atgongd til FAS skipanina, verða álagdar útlendsku reiðaríunum ávísar skyldur. Skipaeigarin skal vera føroyskur, oftast føroyskt stovnað partafelag, og hava flestu reiðarí føroyskt umboðsfólk, sum kann binda eigararnar mótvegis føroysku myndugleikunum. Fyri at fáa lut í afturberingini av manningarskattinum, mugu reiðaríini hava føroyskt bankasamband, og hava tey skyldu til at tekna tryggingar móti avleiðingum frá arbeiðsskaða í føroyskum tryggingarfelagi.

***Shipping umsiting á landi umfatar:***

- Umboðsfólk – samband við FAS og Skipaeftirlit
- Umboð í nevndina og/ella stjórn í føroyska partafelagnum
- Tænastur til at stovna og røkja bankasamband
- Bókhald og bóking av manningarlønum
- Samband við TAKS – uppfylla eftirlitskrøvini
- Tænastur til at tekna arbeiðsskaðatrygging – og aðrar tryggingar av skipum og góðsi
- Manning av skipum
- Teknisk umsiting av skipum
- Søla av tólum og útgerð til skip og manning
- Meklaravirksemi

Omanfyrinevndu vinnur kunnu longu nú staðfesta inntøkur frá skipunum, sum eru skrásett í FAS. Inntøkurnar fara uttan iva, sum frá líður, at økjast, so hvørt sum føroyingar verða kappingarførir við vørum og tænastum.

***Sakførarar og grannskoðarar verða nýttir til at avgreiða:***

- Løgfrøðiligar spurningar og tulkingar í sambandi við skráseting av partafeløgum, skipum og veðsetingum
- Grannskoðan og ráðgeving

Tá tað snýr seg um løgfrøðiligar spurningar, skatta- og roknskaparreglur verða føroyskir advokatar og grannskoðarar nýttir at greiða spurningarnar. Útlendsku reiðaríini gera hinvegin sítt heimaarbeiði við at kanna somu viðurskifti í teirra heimlandi, so í praksis merkir hetta oftast, at føroyskir og útlendskir sakførarar og grannskoðarar samskifta sínámillum. Tilgongdin í sambandi við, at eitt útlendskt skip skal skrásetast í FAS, er ofta long og tvørlig, tí ofta eru nógvir partar. Eigararnir kunnu vera skipaðir í allar hugsandi sambindingar og tað sama við fíggingarstovnunum. Tískil verða sakførarar og grannskoðarar nógv nýttir í sambandi við skráseting.
Feløg, sum eru undir FAS-skipanini, hava roknskaparskyldu og grannskoðanarskyldu í Føroyum, og harumframt er vanligt hjá útlendsku reiðaríunum at fáa skattaráðgeving, bókhaldshjálp og hjálp í sambandi við lønarflytingar frá føroyskum grannskoðanarvirkjum.

***Trygging og fígging***

Peningastovnarnir eru við til at veita fígging til shippingvinnuna. Tryggingarfeløgini fáa nú fleiri inntøkur, tí tað nú er krav, at arbeiðsskaðatrygging skal teknast hjá føroyskum tryggingarfelagi. Saman við tryggingarfeløgunum og bankunum er FAS í løtuni í gongd við at kanna, hvørjar tænastur við fyrimuni kunnu bjóðast fram í Føroyum til útlendsku reiðararnar.

***Útbúgving og skeið***
Krav er um, at útlendskir yvirmenn skulu hava skeið í føroyskari lóggávu á sjóvinnuøkinum. Vinnuháskúlan hevur verið í útlondunum og hildið skeið umborð á útlendskum skipi, umframt at fremmand sjófólk hava verið í Føroyum á skeiði. Skeiðstænastur verða bjóðaðar út á Vinnuháskúlanum og hjá privatum útbjóðara. Í løtuni eru 3 aktørar á økinum at bjóða trygdarskeið út.

Aspirantskipan er sjósett umborð á Norrønu og Eldborg, og hava onnur reiðarí ætlanir um líknandi skipan. FAS hevur vegna Vinnuháskúlan reist fyrispurning, hvørt føroysk sjófólk kunnu fáa vantandi siglingstíðina umborð á "útlendsku" handilsskipunum í FAS, og hava fleiri reiðarí víst seg at vera positiv, serliga sæð út frá einum rekrutteringssjónarmiði.

***Tænastuvinnan – flogferðaseðlar, bilflutningur, hotel og matstovur***
Tað hevur stóran týdning fyri útlendsku reiðaríini at vitja Føroyar, fyri á tann hátt at kunna seg um lokalu viðurskiftini og møta avvarðandi myndugleikum og samstarvsfeløgum. FAS er javnan vertur fyri útlendskum reiðaríum, ráðgevarafyritøkum og umboðum fyri útlendsk reiðarafeløg. Tað kann eisini staðfestast, at hetta smittar positivt av upp á ferðavinnuna.



# 9 Keldur


- Álit um Føroysku Altjóða Skipaskránna (FAS), januar 2006
- Frágreiðing um Føroyska Altjóða Skipaskrá, februar 2008
- Frágreiðing “Danmark som Europas førende søfartsnation”, Økonomi- og Erhvevsministeriet, marts 2006
- Stortingsmelding “Vilje til vekst for norsk skipsfart og de maritime næringer”, Nærings- og handelsdepartementet, 2004
- Maritim strategi 2007 “Stø kurs”, Nærings- og handelsdepartementet, 2007
- Strategiplan 2008-2011, Sjøfartsdirektoratet
- Kommissionen for de Europæiske Fællesskaber “EUs søtransportpolitik frem til 2018 – strategiske mål og anbefalinger” 2009
- Álit um bachelorútbúgvingar á Vinnuháskúlanum frá juni 2006